Haldið Sosialin ... tí góð bløð hanga ikki á trøunum

TÝSDAG
MIKUDAG
HÓSDAG
FRÍGGJADAG
LEYGARDAG

Sosialurin er lettur at tryggja sær.

Tekna eitt hald fyri einans **400,– KR. UM ÁRSFJÓRÐINGIN**
og spar 380,- kr. ella 47% í mun til at keypa hann í leysasølu.
(600 kr. um ársfjórðingin í Danmark - ella 500,- kr. fyri 5 blað 1 ferð um vikuna)

Um tú frammanundan er haldari, kanst tú herafturat halda
Internet-Sosialin fyri einans 120,- kr. um ársfjórðingin.

Ja!

Eg tekni meg sum haldara av Sosialinum og gleði meg til at fáa blaðið 5 ferðir um vikuna fyri 400,- kr. um ársfjórðingin.

Navn:

Bústaður:

Postur/Bygd/Bbýur:

Telefonnummer:

Undirskrift:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Opið kríggj millum SvF og Tjóðveldisflokkin

Skemt, kallar Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður, hendingina, tá ein tíðindamaður hjá SvF kendi seg so hóttan, at stjórin sendi Tjóðveldisflokkinum kæru í málinum. Høgni Hoydal, floksformaður, undrast á brævið frá sjónvarpsstjóranum

UPPGERÐ
Ingi Rasmussen

Opið kríggj er millum Sjónvarp Føroya og Tjóðveldisflokkin.

Var tað ikki greitt longu áðrenn, so er tað nú. Sjónvarpsstjórin hevur sent formanni Tjóðveldisfloksins eitt hvassorðað bræv, sum varð almannakunngjørt í Dimmalætting í gjár. Í brævinum leggur hann Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann hjá flokkinum, beinleiðis undir at hótta tíðindafólk hjá Degi og viku.

Páll á Reynatúgvu vil ikki gera viðmerkingar til málið, men kemur helst við sínari versjón av málinum seinni. Hann sigur tó so mikið viðvíkjandi tilburðinum, har ein tíðindamaður hjá sjónvarpinum kendi seg hóttan, at talan var um skemt. Men kanska var sendarin ikki nóg týðiligur, leggur hann afturat.

Hoydal undrast

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, hevur áður kallað tíðindaflutningin hjá SvF fyri hetz ímóti Tjóðveldisflokkinum, og nú verður helst torført at rætta álitið uppaftur. Hann váttar at hann hevur fingið teldubræv frá sjónvarpsstjóranum, men vil ikki gera ítøkiligar viðmerkingar, fyrr enn hann hevur svarað Sjónvarpi Føroya.

– Eg kann bara siga, at eg undrist stórliga á, at hetta brævið kemur nú, tí tað kemur beint eftir, at eg havi sent kæru til sjónvarpið um eitt ávíst tíðindainnslag, sum eg meini varð beinleiðis ósatt. Eg fekk onki svar og fekk at vita, at tað vildi mann ikki taka støðu til. Í staðin fái eg eitt svar um landsstýrismannin hjá okkum, sigur Høgni Hoydal.

Hann var sjálvur til staðar, tá tann eina hendingin, sum sjónvarpið kærir um, fór fram í Almannaráðnum. Hann sigur seg ikki kenna støðuna aftur, sum Sjónvarpið lýsir hana, men leggur afturat, at tað er so ymiskt, hvussu fólk uppliva. Í hesum sambandi undrast hann á, at ákærurnar verður fórdar fram í fjølmiðlum, uttan at mótparturin sleppur at verja seg. Tað er annars eitt journalistiskt grundsjónarmið.

Øði og ring luft

Ákærurnar í brævinum frá SvF eru ógvusligar.

Í fyrstu syftu kærir SvF seg um, at ein tíðindakvinna varð koyrd úr Almannaráðnum. Páll á Reynatúgvu skal í »sansaleysari øði« hava noktað henni at tosa við aðalstjórran og síðan blakað hana út, tí hon ikki hevði fingið loyvi at seta spurningar í sambandi við ein arbeiðsfund.

»Tað eri eg, sum bestemmi her. Eg havi myndugleika at blaka teg út. ÚT! Og tað geri eg,« endurgevur SvF landstýrismannin fyri at hava sagt.

Hetta er stutt eftir, at sama tíðindakvinna í einum innslagi hevur sagt Tjóðveldisflokkin spæla sjónleik í sambandi við samgongukreppuna, og tí er luftin ikki serliga góð teirra millum.

Hóttan ella skemt

Men tað er annar tilburður, sum er tann álvarsligari. Ein tíðindamaður hjá SvF situr og drekkur kaffi í løgtinginum, tá Páll á Reynatúgvu sigur honum, »at hann var farin at kanna persónligar upplýsingar um journalistarnar í SvF, og næstu ferð, tey hættaðu sær at vera kritisk ímóti Tjóðveldisflokkinum, skuldi hann syrgja fyri at almannakunngera so nógvar persónligar og betentar upplýsingar um tíðindafólkini, at tey blivu spilt út í fjølmiðlunum,« stendur skrivað í brævinum.

Tað gongur eisini fram av brævinum, at Páll á Reynatúgvu seinni sama dag møtir tveimum øðrum starvsfólkum í SvF og sigur teimum, at hann í skemti hevur hótt tíðindamannin.

Út um mark

Antin skilja sjónvarpsfólkini ikki skemtingarlagið hjá Páll á Reynatúgvu. Ella er hann lopin framav. Sjónvarpsstjórin heldur tað seinna.

Mikkjal Helmsdal hevði ikki tíð at tosa við Sosialin, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men við Útvarp Føroya segði hann týskvøldið, at tað er eitt mark fyri, hvat ein miðil eigur at góðtaka. Og í hesum førinum heldur hann, at landsstýrismaðurin er farin um tað markið.

SKRÁIN HJÁ TELEVARPINUM HESA VIKUNA ...

Televarpið fer nú eisini at senda í Klaksvík og megin-Eysturoy.
Í hesum sambandi skipa vit fyri framsýningartiltøkum í hesum støðum:

1. apríl í Klaksvík
Telebúðin og Elding.

2. apríl megin-Eysturoy
Telebúðin, Opus, Radiobúðin í Runavík og Elding.

3. apríl í Tórshavn
Telebúðin, LM Handilin, Radiohandilin, Damor, Delta, Marconi og Elding.

FRAMSÝNINGARTILBOÐ
Á framsýningarstøðunum bjóða vit hesar ásettu dagar móttakarar fyri einans kr. 1.995,- (vegl. prisur er 2.195,-).

KØTILBOÐ ... frá kl 10.00!!!
Frá kl. 10.00 fáa 10 tey fyrstu, ið tekna eitt Televarpshald á nevndu plássum móttakarán fyri einans kr. 1.795,-.

KAPPING
Televarpið skipar eisini fyri spennandi spurnarkapping, har moguleiki er at vinna ein Televarpsmóttakara. Kom inn í eina av nevndu solubúðum og royn tina vitan um Televarpið. Drigið verður kl. 17.00 hvonn framsýningardag.



Tel 340340
www.televarp.fo